VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.



Veðrið leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi, um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.



Veðrið sunnudagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og regn, týsdagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

Stóribeiggi á netinum

SurfControl er eitt forrit, sum loyvir leiðslum at fylgja við, hvat starvsfólkið ger á netinum. Endamálið er at spara pening, men tú sleppur eisini at spæla Big Brother

BIG BROTHER
Heri á Rógvi

Jógvan Heinesen frá SecureIT og Sigurd Mikladal, sølumaður hjá Com-Data, geva netumsitarum ein møguleika at vera stóribeiggi.
Mynd: Heri á Rógvi

Í Føroyum hava flest øll virki ella fyritøkur fast samband við alnetið. Í nógv teimum flestu førum verður goldið eitt fast gjald og eitt gjald fyri hvørt megabeit, ið verður tikið niður av netinum, t.e. alt alt »download« og teldubrøv, ið eisini verða tikin niður av einum servara.

Tað er ymiskt, hvat hetta gjaldið er fyri hvørt megabeit, men hetta liggur kanska um 75 oyru.

Tað er eyðsæð, at tá goldið verður fyri hvørt megabeit, kann rokningin gerast dýr, tá starvfólk hvør í sínum lag fáa stórar fílar við teldubrøvinum, downloada sangir ella javnan nýta RealPlayer at síggja sjónvarp ella hoyra radio.

Surf Control er eitt forrit, sum loyvir tær at fylgja við, hvat fólk á netinum hjá tær nýta alnetið til. Surf Control er ikki nakað eindømi, men fleiri forrit finnast, ið loyva einum netumsitara at vera stóribeiggi.

Talan er í veruleikanum um tvey forrit. Eitt Web filter og eitt e-mail filter. Sum nøvnini siga, er eitt til teldupost, og hitt er til surfing og annað.

Við einum og hvørjum firewall kanst tú síggja, hvar fólk á netinum hava ferðast á alnetinum, men við hesum forritinum verður tað eitt sindur høgligari. Møguleikararnir eru nógvir: Brúkarar kunnu noktast at taka niður ymsar fílar, brúkararar kunnu haldast av netinum í ávís tíðarskeið og mangt annað. Tað ber enntá til at skipa soleiðis fyri, at allar myndir við naknum konufólkum ella kanska naknum mannfólkum ikki kunnu sendast til brúkarar umvegis teldupost. Forritið hevur møguleika at »hyggja« at myndunum, áðrenn ein brúkari fær tær.

– Fólk mugu venja seg við, at alt tað, tey gera á netinum, kann sporast og finnast aftur, sigur Jógvan Heinesen frá SecureIT.

Tað er SecureIT í Keypmannahavn, sum umboðar forritið í Danmark. Í Føroyum verður hetta gjørt í samstarvi við Com-Data. Sum ein referansa kann nevnast, at Tvind nýtti krypteringsforrit frá SecureIT. Hetta gjørdi arbeiðið hjá løgregluni trupult, tí teir kundu ikki fáa fatur á, hvat lá á diskunum á teldunum hjá Tvind.

SurfControl krevur eina 500-600 MHz teldu við 512 Mb Ram. Surf Control kann bert leggjast á teldur við Windows 2000 ella Windows NT stýrisskipanum.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷14
Nuuk	÷13
Qaqortoq	÷11
Ammassalik	÷2
Saint John's	÷9
Halifax	÷2
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	6
Lerwick	4
Aberdeen	3
London	3
Tromsø	3
Bergen	2
Oslo	–
Stokkhólm	6
Keypmannah.	–
Helsinki	–
Moskva	÷5
Berlin	0
Warzawa	0
Kiev	0
Bukarest	÷1
Paris	3
Madrid	6
Róm	–
Malorca	10
Athen	4
Malta	11
Tunis	14
Beijing	4
New Dehli	19
Bangkok	32
Jakarta	28
Sydney	–
New York	2
Miami	25
Los Angeles	15
Meksikobýur	–
Panama	32
La Paz	10
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	17

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 984 hPa yviri á Suðurlandinum fer í landnyrðing. Brúgvalagið haðani til Føroya fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 992 hPa yvir Atlantshavinum á 52N-29V fer móti Íslandi.

Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer norðureftir, men brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum vestan fyri Føroyar.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19/02 kl. 06⁰⁰– 20/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 19/02 kl. 06⁰⁰–20/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 73,7 mm

VESTFALLSKYRRINDI

16. febr.: Fullmáni
19. febr.: Mánin næstur jørðini
23. febr.: Seinna kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
21. feb	09.58	22.23	08.58	21.23	09.13	21.38	11.58	—	00.34	12.58	08.13	20.38	07.13	19.38	10.13	22.38	11.13	23.38	09.43	22.08	10.58	23.23
22. feb	10.48	23.27	09.48	22.27	10.03	22.42	00.33	12.48	01.33	13.48	09.03	21.42	08.03	20.42	11.03	23.42	—	12.03	10.33	23.12	11.48	—
23. feb	—	12.06	11.06	23.46	11.21	—	01.27	14.06	02.27	15.06	10.21	23.01	09.21	22.01	—	12.21	00.42	13.21	11.51	—	00.27	13.06
24. feb	00.46	13.27	—	12.27	00.01	12.42	02.46	15.27	03.46	16.27	11.42	—	10.42	23.10	01.01	13.42	02.01	14.42	00.31	13.12	01.46	14.27

5 707265 100050 >